2025
2024
2023
2022
2021
2020
2019
2018
2017
# 2016

Fíggjarmálaráðið

# Búskaparfrágreiðing II

Fíggjarlógaruppskotið 2016

September 2015

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald

Fororð ........................................ 3
Inngangur ........................................ 5
Lýsing av gongdini í búskapinum ........................................ 7
Almenn fíggjarmál ........................................ 16
Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2016 ........................................ 19
Inntøkur landskassans í 2016 ........................................ 20
Útreiðslur landskassans í 2016 ........................................ 20
Løgur í 2016 ........................................ 21
Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2015 ........................................ 22
Rakstrarjáttanareftirlit ........................................ 25
§ 1 Løgtingið ........................................ 25
§ 2 Løgmansfyrisitingin ........................................ 26
§ 3 Fíggjarmál ........................................ 27
§ 5 Fiskivinnumál ........................................ 28
§ 6 Vinnumál ........................................ 29
§ 7 Mentamál ........................................ 30
§ 11 Heilsumál ........................................ 31
§ 12 Almannamál ........................................ 32
§ 20 Inntøkur ........................................ 33
Løgujáttanareftirlit ........................................ 35

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • FO-165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • ✉ fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

# Fororð

15. september 2015 tók nýggja samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn við landsins leiðslu. Farið verður nú undir at fremja tey mál, ið samgongan hevur sett sær fyri í samgonguskjalinum undir heitinum: Samhaldsfesti, sjálvbjargni og frælsi.

Nú bert fáir dagar eru, síðani samgongan varð skipað, og Stýrisskipanarlógin áleggur, at leggjast skal fyri Løgtingið fíggjarlóg fyri komandi fíggjarár fyri 1. oktober, leggur landsstýrið í fyrsta umfari fram eina framroknaða fíggjarlóg, grundað á verandi lóggávu og uttan átøk á inntøku- og útreiðslusíðuni. Henda fíggjarlógin lýsir sostatt verandi fíggjarstøðuna hjá landinum, um ongi átøk verða framd. Síðani fer landsstýrið at koma við broytingaruppskoti og fylgilóggávu seinni í ár.

Úrslitið í fyribils fíggjarlógini vísir, at landið stendur yvir fyri stórum avbjóðingum fíggjarliga. Tí verða ongi átøk framd, verður talan um hall, sum er 144 mió. kr. í 2016, og tað er enntá uttan innroknaðan lønarvøkstur og javning. Eisini er hetta úrslitið, hóast inntøkur frá forskattaðum pensjónum eru nærum 300 mió. kr.

Hetta er sostatt fíggjarliga útgangsstøðið hjá nýggju samgonguni.

Hetta er somuleiðis fíggjarliga støða landsins, hóast vit eru í góðum búskaparligum tíðum, og hóast søguliga góðar fyritreytir seinastu árini. Serliga hevur stór framgongd verið í uppsjóvarvinnuni og alivinnuni, og tað sæst eisini aftur í einum stórum vøkstri, sum er um 2,4 mia. kr. í føroysku framleiðsluni – BTÚ – seinastu 4 árini. Eisini hevur rentan verið søguliga lág, oljuprísirnir eru lágir og altjóða laksaprísirnir høgir.

Hóast hetta, hevur landið stórt hall, samstundis sum langtíðar haldførið í føroyska búskapinum er versnað. Hetta er alt annað enn nøktandi.

Hetta bendir greidliga á, at førdur er ein ov stuttskygdur politikkur, sum als ikki nóg væl er komin øllum samfelagnum, fólkinum og landinum til góðar.

Fleiri viðurskifti stuðla eisini undir, at so er. Tí hóast stóran vøkstur í samlaðu framleiðsluni, vøkstur í eginogn hjá privatum fyritøkum, vøkstur í innlánum og vøkstur í bilasølu, er ójavnin vaksin, skuldin hjá landinum vaksin, og MVG inntøkurnar og privata nýtslan eru lægri enn væntað. Eisini er tann parturin av bruttotjóðarinntøkuni, sum er fallin løntakarunum í lut, minkaður seinastu árini, meðan parturin hjá kapitalánarunum er vaksin. Hartil er talið av løntakarum framhaldandi nærum 1.400 lægri, enn tá ið tað var í hægst í 2007.

Nakrar av meginorsøkunum til hetta eru, at øktu virðini í samfelagnum eru savnað á ov fáum hondum, at nýskipanirnar av samfelagnum enn ikki eru framdar í verki, samstundis sum førdur er ein ov stuttskygdur fíggjarpolitikkur, ið hevur minkað búskaparliga haldførið hjá landinum nú og frameftir.

Hetta fara nýggja samgongan og landsstýrið at gera nakað við sum skjótast. Tí vit hava sett okkum sum mál at venda halli til avlop, og at venda óhaldførum búskapi til haldføran og sjálvberandi búskap, ið skal vera eitt trygt grundarlag undir føroyska samfelagnum nú og inn í framtíðina.

Nøkur átøk fara longu at síggjast í endaligu fíggjarlóg landsins fyri 2016. Nøkur átøk fara at geva úrslit í valskeiðinum, og onnur fara serliga at geva úrslit, sum frá líður, og fara at tryggja haldføran búskap. Millum átøkini, ið verða framd, eru hesi:

Venda halli til avlop og harvið steðga vøkstrinum í skuld landsins, sum í løtuni er um 5,7 mia. kr. Hetta verður millum annað gjørt við at tálma útreiðsluvøkstrinum og at økja inntøkur landsins. Fleiri nýskipanir skulu nú eisini fremjast í verki – millum hesar eru pensjónsnýskipan, fiskivinnunýskipan og heilsunýskipan. Ætlanin er hartil at lata ein skattalætta til lág- og miðallønt, ið fer at tryggja eitt javnari býti av landsins virðum og seta ferð á privatu nýtsluna. Eisini verða íløgur gjørdar í fólkavøkstur eitt nú betri bústaðarmøguleikar, fleiri útbúgvingar og betri umstøður til barnafamiljur.

Góðir møguleikar eru at venda gongdini frá halli til avlop og frá óhaldførum búskapi til haldføran búskap. Føroyar eru millum ríkastu lond í heiminum. Fyri hvønn íbúgva kanska tað ríkasta landið, um vit bert gagnnýttu stóra ríkidømi okkara til fulnar. Sjálvt uttan neyðugu átøkini er okkara tøka BTI pr. íbúgva mett at vera hægri enn eitt nú í Íslandi og í Danmark. Eftir er bert at fremja nýskipanirnar, fáa í lag javnari býti av landsins virðum, størri virðisøking úr tilfeingi okkara, reka miðvísan vinnupolitikk og gera íløgur í framtíðina og fólkavøksturin.

Við hesum átøkum, saman við skilagóðum fíggjarpolitikki, fara vit at røkka einum sjálvbjargnum og haldførum føroyskum búskapi til fyrimunar fyri okkum øll, okkara børn og komandi ættarlið – og tryggja føroyingum eitt samfelag við størri samhaldsfesti, sjálvbjargni og frælsi.

Kristina Háfoss
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum

# Inngangur

Sambært § 9 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, samstundis sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram, leggja fram frágreiðing (Búskaparfrágreiðing II), sum gjølligari lýsir og metir um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum og greiðir frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum.

Nýtt landsstýri tók sum kunnugt við miðskeiðis í september í ár. Orsakað av stutta skotbránum til, at uppskotið til fíggjarlóg fyri 2016 skuldi latast Løgtinginum, hevur landsstýrið lagt eitt framroknað uppskot til fíggjarlóg fyri Løgtingið. Inntøku- og útreiðslutiltøk og ætlaðar raðfestingar hjá nýggja landsstýrinum eru sostatt ikki tikin við í uppskotið til fíggjarlóg. Stundir hava ikki verið hjá nýggja landsstýrinum at fyrireika og leggja til rættis ymisk tiltøk og átøk ella at gera neyðugu lógaruppskotini.

Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2016 er tí framroknað við verandi inntøkum og lóggávu og metingum um útreiðslur á heilsu-, útbúgvingar- og almannaøkinum. Ætlanin er í staðin at arbeiða við ymiskum broytingaruppskotum og í sambandi við viðgerðina av uppskotinum í Løgtingsins fíggjarnevnd.

Frágreiðingar frá Búskaparráðnum og Fíggjarmálaráðnum seinastu árini hava lagt áherðslu á, at samsvar er ikki millum almennar inntøkur og útreiðslur sæð yvir eitt langt áramál, og at almenni búskapurin tí ikki er haldførur. Støðan við vánaliga haldførinum í almenna búskapinum stavar mest frá, at landið hevur havt lutfalsliga stór hall, hóast stóra framgongd og hákonjunktur í búskapinum. Harafturat fer haldførið at versna næstu árini av broytingum í fólkasamanseting.

Tað merkir, at landið hevur tikið á seg lutfalsliga nógva skuld, hóast stór framgongd hevur verið í búskapinum. Við tí fer landið at hava minni búskaparpolitiskt rásarúm, og minni verður at standa ímóti við, tá ið konjunkturarnir venda, sum teir helst gera.

Nýggja landsstýrið hevur sum mál, at hallið hjá landinum verður burtur í 2016. Tað merkir eisini, at øll fíggjarpolitisk tiltøk, sum hava við sær hægri útreiðslur ella lægri inntøkur, verða fíggjað fult og heilt við at hækka summar inntøkur ella lækka aðrar útreiðslur.

Framrokningar av inntøkum og útreiðslum í uppskotinum eru dagførdar og grundaðar á verandi lóggávu og bundnar raðfestingar. Inntøkurnar í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2016 eru framroknaðar við støði í søguligum tølum fyri inntøkur og gongd og annars við støði í fyritreytum og lóggávu, sum er galdandi í løtuni. Inntøkurnar eru framroknaðar við ársins prísum í 2016 og framroknaðar við føstum prísum árini 2017 og frameftir.

Stórur partur av inntøkunum í fíggjarlógini eru skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu gongdini í samfelagnum. Inntøkusíðan í fíggjarlógini er tí fyri stóran part grundað á metingar um gongdina í búskapinum í framtíðini. Til ber at gera forsagnir og at meta um búskaparvøkstur í nærmastu framtíð, men eingin kann spáa neyvt um búskaparvøkstur fleiri ár fram í tíðina. Tí skulu metingarnar av inntøkum landskassans í framtíðini lesast við fyrivarni.

Útreiðslusíðan er ikki eins torfør at meta um, av tí at størsti parturin av útreiðslunum er grundaður á politiskar raðfestingar av tænastum og veitingum, sum samtykt er, at almennu Føroyar skulu bjóða. Óvissan á útreiðslusíðuni snýr seg serliga um gongdina í rentum, gongdina í oljuprísum og um úrslitini av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Búskaparpolitiska avbjóðingin er, at tiltøk, sum minka um hallið á fíggjarlógini, kunnu samstundis tálma eftirspurning og búskaparvøkstur og tí eisini ávirka inntøkur landskassans. Tiltøk, sum skerja útreiðslur landskassans, ella tiltøk, ið økja skatta- og avgjaldsinntøkurnar, ávirka í flestu førum eftirspurningin í samfelagnum og tí eisini í ávísan mun bæði búskaparvøkstur og inntøkur landskassans.

Sum grundarlag undir metingunum um búskaparvøkstur næstu árini verða brúkt søgulig tøl, vitan um búskapargongdina síðstu árini og vitan um gongdina innan ymisk tjóðarbúskaparlig vísitøl. Eisini verða metingar hjá Búskaparráðnum og ymiskum altjóða stovnum brúktar sum partur av grundarlagnum at meta um búskaparvøksturin og inntøkurnar hjá landinum.

Eisini skal viðmerkjast, at í framrokningunum er lagt upp fyri serligum viðurskiftum í ávísum vinnugreinum, har ið umstøðurnar tala fyri tí. Í fyritreytunum fyri 2016 verður vøksturin í BTÚ mettur til um leið 3% (ársins prísir). Hesar metingar samsvara væl við nýggjastu metingarnar frá Búskaparráðnum. Grundað á eina fyrivarnisreglu, er metingin um búskaparvøkstur heldur varislig.

Skattir, ið eru grundaðir á inntøku og nýtslu, til dømis vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, verða í fyritreytunum settir at fylgja á leið sama vøkstri sum BTÚ, ella um leið 3% í 2016 og árini eftir. Tó eru gjørdar serligar metingar út frá fyritreytunum fyri játtanina á teimum inntøkujáttanum, har tað verður mett neyðugt og har, ið umstøðurnar tala fyri tí. Fyritreytirnar fyri framskrivingunum av rentuútreiðslunum eru metta gongdin í landskassaskuldini sum heild og útlitini fyri rentugongdina næstu 1-2 árini.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum og í altjóða búskapinum. Síðani er ein lýsing av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2016. At enda er frágreiðing um játtanarligu støðuna í ár, samanlagt og fyri hvørja grein sær. Her eru bara tiknar við tær rakstrar-, løgu- og inntøkujáttanir, sum verða mettar at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið fíggjarárið endaliga er gjørt upp.

## Lýsing av gongdini í búskapinum

Framgongd er framvegis í búskapinum, tó at framgongdin hæsaði nakað av miðskeiðis í 2015. Framgongdin byrjaði av álvara fyrra hálvár 2013 og helt síðani fram í 2014 og fyrstu mánaðirnar í 2015. Flestu lyklatøl benda á, at vøksturin minkaði miðskeiðis í ár. Hetta sæst serliga, verður hugt eftir lønargjaldingum og løntakarum, men eisini almennu inntøkurnar, hagtøl yvir nýtslu og arbeiðsloysi, fólkaflyting og innflutning benda á tað sama.

Mynd 1

Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2016




* Tølini fyri 2014 til 2016 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og Búskaparráðið.

Sambært metingum hjá Búskaparráðnum og Hagstovuni vaks BTÚ um leið 6% í 2014 og er mett at vaksa um leið 6,4% í 2015. Bæði tøl eru í ársins prísum og skulu ikki sammetast við uppgerðir í føstum prísum úr øðrum londum. Mett verður, at vøksturin verður um leið 3% í 2016. Metingarnar samsvara við forsagnir, sum Fíggjarmálaráðið hevur brúkt í sambandi við undanfarnar fíggjarlógir og játtanarkarmar. Mynd 1 omanfyri vísir gongdina í BTÚ fram til 2013 og forsagnir fyri árini 2014-16.

Vøksturin síðstu árini er fyri stóran part komin av vaksandi útflutningi av uppsjóvarfiski og alifiski. Útflutningurin er vaksin bæði í virði og nøgd. Harafturat stavar vøksturin síðstu árini frá óvanliga nógvum privatum og almennum íløgum. Hildið verður, at vøksturin í 2016 í størri mun fer at koma av vaksandi innlendis eftirspurningi – bæði av privatari nýtslu og íløgum. Mynd 1 vísir gongdina í BTÚ fyri árini 1998-2013 og forsagnir fyri 2014 til 2016.

Inntøkumetingar í fíggjarlógaruppskotinum byggja í flestu førum á, at vøksturin verður um leið 3% í 2016 og 2017. Sæð yvir styttri áramál kunnu frávik vera millum almennu inntøkurnar og vøksturin í búskapinum, og roknast kann ikki við, at allar inntøkurnar hjá landinum fara at vaksa 3% í 2016 og 2017. Á fleiri inntøkujáttanum er lagt upp fyri serligum umstøðum, sum tala fyri, at serstøk meting verður gjørd fyri inntøkurnar.

Í løtuni er størri óvissa enn vanligt um gongdina í heimsbúskapinum, millum annað um búskaparstøðuna í Kina, Russlandi og um oljuprísir. Harafturat hevur órógv verið á partabrævamarknaðum um allan heimin. Føroyski búskapurin og flestu av okkara grannalondum –

undantikið Noreg – fáa fyrimunir, tá ið oljuprísir lækka. Hetta kemur av, at flestu lond eru nettoinnflytarar av olju, sum merkir, at býtislutfallið batnar, tá ið oljuprísir lækka. Heimsbúskapurin sæð undir einum verður eisini stimbraður av lægri oljuprísum, tó at ávís lond missa týðandi inntøkur av útflutningi, tá ið oljuprísir lækka.

Fiskivinnan á heimligu leiðunum gevur í løtuni lítið ískoyti til vøksturin í búskapinum. Ein glotti sammett við áður er kortini, at avreiðingarprísir á botnfiski eru hægri í ár sammett við 2014, og tí er avreiðingarvirðið nakað hægri í ár. Fiskiskapurin eftir botnfiski á Landgrunninum er framvegis sera vánaligur, og bæði toska- og hýsustovnurin eru søguliga smáir og illa fyri. Útlit eru heldur ikki til stórvegis frægari fiskiskap eftir botnfiski undir Føroyum næstu 1-2 árini. Framleiðsla og avlop í hesi vinnuni eru kortini sera lítil, og roknast kann bara við lítlum ískoyti til vøksturin frá hesi vinnuni og frá atknýttu fiskavirkisvinnuni á landi næstu árini.

*Arbeiðsmarknaðurin*

Arbeiðsloysið er lækkað úr um leið 7,5% tíðliga í 2011 til 3% í juli 2015. Tá ið umstøðurnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru góðar, er vanligt, at fráflytingin minkar og tilflytingin veksur. Hetta fyribrigdið hevur eisini verið at sæð síðani ársskiftið 2012-13, tá ið fráflytingin av álvara fór at minka. Á mynd 2 niðanfyri sæst gongdin í arbeiðsloysinum og í løntakaratalinum.

**Mynd 2**

**Árstíðarjavnaðir løntakarar (við A-inntøku) í tali og árstíðarjavnað arbeiðsloysi í %, jan-1985 til jul-2015**




Kelda: Hagstovan.

Arbeiðsloysið er toluliga javnt lágt kring alt landið, tó at tað er nakað hægri millum ávísar bólkar og í ávísum økjum í landinum. Tó er einki øki í landinum, har ið arbeiðsloysið kann sigast vera serliga høgt. Hagtølini benda á, at arbeiðsloysið millum ung er ikki stórt í Føroyum sammett við flest onnur framkomin lond. Ein orsøk til lítla arbeiðsloysið millum ung er helst, at fleiri ung eru vorðin lesandi sammett við áður. Talið av lesandi á miðnámi og á hægri útbúgvingum er hækkað síðstu árini, og fleiri føroyingar lesa eisini uttanlands.[1]

[1] Henda gongd sæst í hagtølum á heimasíðuni hjá Studna. Skúlaárið 2014/15 er talið av føroyingum á hægri útbúgvingum tó lækkað, men gongdin hevur yvirhøvur verið hækkandi síðstu árini.

Mynd 3

Lønargjaldingar í mió. kr., býtt á ársfjórðingar, 1. ársfjórðingur 1985 til 2. ársfjórðing 2015




Kelda: Hagstovan.

Talið av løntakarum er vaksið meira enn 3% síðsta árið, og løntakaratalið er tað hægsta síðani tíðliga í 2010. Talva 1 vísir løntakarar í juni síðani 2012 eftir høvuðsvinnubólkum. Løntakararnir eru vorðnir fleiri serliga í fiskivinnuni og byggivinnuni. Løntakararnir eru eisini fleiri í privatum og almennum tænastuvinnum.

Á mynd 2 síggjast arbeiðsloysi og løntakarar í tali síðani ársbyrjan 1985. Ein orsøk til, at løntakaratalið í Føroyum er hækkað munandi síðsta árið, kann vera, at minni virksemi er í frálandavinnuni í Noregi og aðrastaðni nú, og at færri størv tí eru í vinnuni sum heild vegna lágu oljuprísirnar.

Talva 1. Løntakarar eftir vinnubólkum í juni, býtt á ár

| *Vinnubólkur* | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Munur 2014-15 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 4.000 | 3.879 | 3.810 | 4.081 | 271 | 7,1 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 3.032 | 2.995 | 3.265 | 3.421 | 156 | 4,8 |
| Privatar tænastuvinnur | 8.026 | 8.031 | 8.113 | 8.352 | 239 | 2,9 |
| Almenn o.o. tænasta | 8.960 | 8.961 | 8.975 | 9.094 | 119 | 1,3 |
| **Løntakarar tilsamans** | **24.018** | **23.866** | **24.163** | **24.948** | **785** | **3,2** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Lønargjaldingarnar í Føroyum vaksa í løtuni um leið 6% árliga, men vøksturin er hæsaður nakað av miðskeiðis í ár. Vøkstur er serliga í byggi- og fiskivinnu, men eisini í privatum og almennum tænastuvinnum eru lønirnar vaksnar. Á mynd 3 og talvu 2 sæst gongdin í lønargjaldingum til samans og býtt á vinnugreinar.

**Talva 2. Lønargjaldingar í høvuðsvinnugreinum, januar-august, 2012-2015, mió. kr.**

| *Vinnugrein* | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Munur 2014-15 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 853 | 830 | 870 | 1.003 | 133 | 15,2 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 555 | 541 | 601 | 654 | 53 | 8,8 |
| Privatar tænastuvinnur | 1.546 | 1.555 | 1.593 | 1.654 | 60 | 3,8 |
| Almenn o.o. tænasta | 1.697 | 1.749 | 1.783 | 1.846 | 62 | 3,5 |
| **Lønargjaldingar tilsamans** | **4.650** | **4.674** | **4.848** | **5.156** | **308** | **6,4** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

*Húsarhaldsnýtsla og eftirspurningur*

Húsarhaldsnýtslan í Føroyum og í øðrum framkomnum londum lækkaði ógvusliga eftir búskaparkreppuna í 2009. Síðani er nýtslan vaksin aftur, og serliga í 2013 og 2014 er nýtslan vaksin. Hagtøl um smásølu, meirvirðisgjald og innflutning av nýtsluvørum benda á, at nýtslan eisini er vaksin í ár, men at vøksturin hæsaði nakað av miðskeiðis í ár.

**Mynd 4**

**Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan-1998 til feb-2015**




Kelda: Hagstovan.

Mynd 4 vísir innflutning av ymiskum nýtsluvørum býtt á ódrúgvar nýtsluvørur og hálvdrúgvar og drúgvar nýtsluvørur (íroknað innflutning av akførum). Myndin vísir greitt, at støðugur vøkstur hevur verið í vøruinnflutninginum síðani 2013. Hetta er sjálvsagt eisini tekin um, at nýtsla og eftirspurningur eru vaksin. Mynd 5, sum vísir eitt vísital yvir smásølu, grundað á meirvirðisgjaldið, gevur somu ábending, men bendir á heldur minni vøkstur í nýtsluni, sammett við mynd 4.

Føroysk húsarhald hava sum heild ikki nógva skuld, verður sammett við húsarhald í flestu øðrum londum í Vesturheiminum. Roknast kann helst við vaksandi nýtslu næstu 1-2 árini, av tí at arbeiðsloysið er lágt, fólkatalið veksur í løtuni, umframt at reallønin er hækkandi hjá flestu løntakarum (lønirnar hækka, og brúkaraprísir eru óbroyttir ella lække). Harafturat hevur nýtslan verið heldur lág síðani fíggjarkreppuna í 2009.

Mynd 5

Vísitøl fyri smásølu, býtt á vørubólk, trendur í føstum prísum, 1. ársfjórðingur 1995 til 1. ársfjórðing 2015




Kelda: Hagstovan.

Meginparturin av privatu nýtsluni í Føroyum er vendur móti innfluttum vørum, og roknast kann tí bara við avmarkaðum ískoyti til búskaparvøksturin frá meiri húsarhaldsnýtslu. Inntøkurnar hjá landinum frá meirvirðisgjaldi og øðrum avgjøldum hækka hinvegin vanliga nógv, tá ið nýtslan veksur.

Mynd 6

Brúkaraprístalið, 2001 til 2015, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100




Kelda: Hagstovan.

Brúkaraprístalið er lækkað síðani fyrsta ársfjórðing 2013, og prístalið er lækkað um leið 1% seinasta árið, sí mynd 6. Høvuðsorsøkin til, at prístalið er lækkað, er at oljuprísir eru lækkaðir, og at rentustøðið í Føroyum er lækkað.

Samlaða konjunkturvísitalið hevur verið at kalla støðugt síðani miðskeiðis í 2011. Vísitalið vísir í stuttum, at vinnuvirki og húsarhald eru bjartskygd um framtíðina, sí mynd 7. Samanumtikið rokna húsarhald við framgongd í búskapinum og støðugum ella lækkandi arbeiðsloysi. Vinnuvirki rokna við støðugum ella hækkandi eftirspurningi. Samlaða konjunkturvísitalið hækkaði úr 18 til 23 síðsta hálvárið. Vísitalið er hækkað fyri allar bólkar síðsta hálvárið, tó ikki fyri byggi- og handilsvinnurnar.

**Mynd 7**

**Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juli 2006 til juli 2015**




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

*Gongdin í fólkatali og í fólkafráflyting*

Nettofráflytingin er minkað líðandi síðani tíðliga í 2013, og fólkatalið samanlagt er eisini vaksið síðani 2013. Frammanundan lækkaði fólkatalið frá 2008 til 2013. Fólkatalið veksur kortini mest í miðøkinum, Streymoynni, Eysturoynni og Norðoyggjum. Aðrastaðni er fólkatalið støðugt ella lækkar, tó at einstakar bygdir eru, har ið fólkatalið veksur. Í talvu 3 sæst gongdin í fólkatalinum síðsta árið býtt á øki í landinum. Mynd 8 vísir árligar broytingar í fólkatalinum síðani 1975 við mettum tølum fyri 2015.

**Mynd 8**

**Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2015**




Viðm.: Tølini fyri 2015 eru forsagnir grundaðar á gongdina januar-juli í ár.
Kelda: Hagstovan.

At fólkavøkstur at kalla bara sæst í miðøkinum, Streymoynni, Eysturoynni og Norðoyggjum, er tekin um, at búskaparvøksturin síðstu árini mest er komin hesum økjunum til góðar, meðan vøksturin ikki í sama mun hevur breitt seg til onnur øki í landinum. Sama fyribrigdi sæst í øðrum framkomnum londum, at búskaparvøkstur at kalla bara sæst kring stóru býirnar og í miðøkjum.

**Talva 3. Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. august 2014 til 1. august 2015**

| *Øki í landinum* | Fólkatal 1. juli 2014 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 1. juli 2015 | Broytt í tali | Broytt í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 5.850 | 32 | 53 | 5.935 | 85 | 1,5 |
| Eysturoy | 10.753 | 43 | 112 | 10.908 | 155 | 1,4 |
| Tórshavnar økið* | 18.488 | 126 | 136 | 18.750 | 262 | 1,4 |
| Streymoyggin annars | 4.518 | 33 | 38 | 4.589 | 71 | 1,6 |
| Vágoy | 3.091 | 2 | -4 | 3.089 | -2 | -0,1 |
| Sandoy | 1.273 | 2 | 10 | 1.285 | 12 | 0,9 |
| Suðuroy | 4.667 | -9 | -35 | 4.623 | -44 | -0,9 |
| **Alt landið** | **48.640** | **229** | **310** | **49.179** | **539** | **1,1** |

*Tórshavn, Hoyvík, Hvítanes og Argir.

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Stór fráflyting var í 2010 og 2011, tá ið stígur var í føroyska arbeiðsmarknaðinum, og arbeiðsloysið vaks nógv. Í 2011 var nettofráflyting, sum var útvið 400 fólk. Í løtuni er nettotilflyting til landið, um leið 300 fólk árliga. Nettofráflytingin er bæði minkað, tí at færri flyta av landinum, og tí at fleiri flyta til landið. Mynd 9 vísir gongdina í til- og fráflyting úr Føroyum býtt á mánaðir.

**Mynd 9**

**Fólk flutt til og úr Føroyum, jan-2007 til juli-2015**




Kelda: Hagstovan.

*Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni*

Á mynd 10 sæst gongdin í føroyska inn- og útflutninginum síðani 1988 við mettum tølum fyri alt 2015. Myndin vísir sum heild, at innflutningurin í stóran mun verður ávirkaður av búskaparligu konjunkturunum í samfelagnum og serliga innlendis eftirspurninginum. Harnæst hava oljuprísir stóra ávirkan á innflutningin, og óvanligur innflutningur av skipum ella flogførum ella óvanligar íløgur kunnu eisini ávirka innflutning nógv okkurt árið.

**Mynd 10**

**Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2015**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við.
* Tølini fyri 2015 eru metingar grundaðar á januar-juli 2015.
Kelda: Hagstovan.

Innflutningurin er síðstu árini vaksin meira ójavnt, sammett við vøksturin í útflutninginum. Útflutningurin er vaksin støðugt síðani 2009 úr um leið 4 mia. kr., og heldur verandi gongd fram, kann roknast við, at útflutningurin í 2015 verður um leið 6,5 mia. kr. Vøksturin kemur serliga av gongdini í alivinnuni og uppsjóvarvinnuni við munandi størri nøgdum og hægri prísum. Avlopið á handilsjavnanum í 2014 var um leið 390 mió. kr., og í 2015 kann roknast við avlopi, sum er um leið 1 mia. kr., heldur verandi gongd fram.

Síðstu árini hava avlop verið á føroyska gjaldjavnanum tey flestu árini, sí mynd 11. Uppgerðir eru ikki tøkar fyri gjaldsjavnan síðani 2012, men handilsjavnin bendir á, at avlop var á gjaldsjavnanum í 2013 og 2014. Sannlíkt verður eisini avlop í 2015.

**Mynd 11**

**Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2014**




* Tølini fyri 2013 og 2014 eru metingar.
Kelda: Hagstovan.

*Heimsbúskapurin*

Vøksturin í heimsbúskapinum er minkaður síðsta hálva árið. Útlit eru kortini til vøkstur í heimsbúskapinum, tó at vøksturin verður minnið enn áður mett. Í stuttum er framvegis lítil ella hóvligur vøkstur í Evropa, Stóra Bretlandi og Japan, meðan vøksturin er minkaður munandi í fleiri menningar- og vakstrarlondum. Í fleiri stórum vakstrarlondum er afturgongd í búskapinum, til dømis í Russlandi, Brasilia og Ukraina. Tekin eru um, at búskapurin í Kina er viðbreknari enn áður hildið, og hagtøl benda á, at vøksturin í Kina er minni, enn almennar metingar áður hava boðað frá.

Eitt tekin um, at stígur er komin í vøksturin í fleiri menningarlondum, er, at altjóða samhandilin við vørum er minkaður um leið 10% í virði higartil í ár. Orsøkirnar eru fleiri millum aðrar, at vøksturin í heiminum er minni, og at rávøruprísir eru lækkaðir. Órógv hevur eisini verið á partabrævamarknaðum í Kina og aðrastaðni í Vesturheiminum, millum annað orsakað av óvissu um veruligu støðuna í búskapinum í Kina.

Stígur er eisini komin í búskapin í Russlandi, sum er meira ávirkað av handilstiltøkum og øðrum tiltøkum úr Vesturheiminum enn áður hildið. Roknast kann við, at búskapurin í Russlandi minkar um leið 5% í ár. Higartil hava tiltøkini hjá Vesturheiminum móti Russlandi havt við sær, at føroyski útflutningurin til Russland er vaksin, av tí at Føroyar ikki hava sett handilstiltøk í verk móti Russlandi. Higartil hava vit tí helst havt fyrimunir av handilstiltøkunum frá Vesturheiminum móti Russlandi. Versnar búskaparstøðan í Russlandi nógv, er ikki óhugsandi, at tað eisini kann ávirka føroyska útflutningin til Russlands.

Í løtuni er nakað av framgongd í framkomnu ídnaðarlondunum, meðan vøksturin er minkaður í flestu menningarlondum. Stórur munur er á vøkstrinum og í arbeiðsloysinum í ymsu londunum. Framgongd er framvegis í USA og Stóra Bretlandi, meðan minni vøkstur er í Evropa og Japan. Framgongdin í heimsbúskapinum fyrra hálvár í ár hevur verið minni enn áður væntað, og serliga í USA og Japan hevur framgongdin verið minni. Vøksturin í menningarlondum er minkaður nakað og hevur verið minni fyrra hálvár í ár, enn áður væntað.

**Talva 4. Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2012-2016 býtt á øki**

| *% um árið í føstum prísum** | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| USA | 2,3 | 2,2 | 2,4 | 2,5 | 3,0 |
| Evruøkið | -0,8 | -0,4 | 0,8 | 1,5 | 1,7 |
| Stóra Bretland | 0,7 | 1,7 | 2,9 | 2,4 | 2,2 |
| Ídnaðarlond tilsamans | 1,2 | 1,4 | 1,8 | 2,1 | 2,4 |
| Menningarlond | 5,2 | 5,0 | 4,6 | 4,2 | 4,7 |
| Heimsbúskapurin | 3,4 | 3,4 | 3,4 | 3,3 | 3,8 |

* Uppgerðirnar eru metingar frá tíðliga í juli mánaði og skulu lesast við fyrivarni.
*Kelda: IMF World Economic Outlook Update, 9. juli 2015.*

Framgongdin í løtuni stavar í stóran mun frá lagaligum peninga- og fíggjarpolitikki. Lágu oljuprísirnir og vaksandi innlendis eftirspurningur stuðla eisini heimsbúskapinum. Serliga í USA verður búskapurin í løtuni stimbraður av vaksandi innlendis eftirspurningi og av góðum umstøðum á arbeiðsmarknaðinum við lækkandi arbeiðsloysi og vaksandi tali av løntakarum. Í

Evropa er minni vøkstur í innlendis eftirspurninginum sammett við í USA. Vinnuvirki í Evropa gera eisini óvanliga fáar nýíløgur í løtuni. Vøksturin í Evropa verður sum heild darvaður av, at skuld hjá húsarhaldum og vinnuvirkjum framvegis er høg í Evropa.

Roknast kann við, at stuðulstiltøkini, sum miðbankar hava sett í verk seinastu árini, sum frá líður verða minkað næstu 1-2 árini. Í løtuni eru renturnar í Vesturheiminum søguliga lágar, og roknast kann við lágum rentum næstu 1-2 árini, tó at rentustøðið kann hækka nakað sammett við verandi lágu rentur. Í talvu 4 síggjast metingar frá IMF um væntaða vøksturin í heiminum næstu árini. Arbeiðsloysið í Evropa er um 10-12% í miðal, meðan arbeiðsloysið í Stóra Bretlandi og USA er 5-6%.

Roknast kann við høgum arbeiðsloysi í Evropa fleiri ár frameftir, av tí at lítil vøkstur er væntandi næstu árini, millum annað av nógvari almennari og privatari skuld, fáum privatum íløgum, broyttari fólkasamanseting og lágum produktivitetsvøkstri sum heild. Harafturat kann roknast við, at fíggjarpolitikkurin verður táttaður, so hvørt sum myndugleikar í Evropa royna at minka hall í almenna geiranum.

Óvissan um gongdina í heimsbúskapinum er framvegis stór, og óvæntaðar hendingar kunnu koma fyri, sum hava við sær, at stígur aftur kemur í búskapin í Evropa. Til dømis kann órógv koma á partabrævamarknaðir, stígur kann koma í búskapin í Kina ella Russlandi, og ófriður í Ukraina ella aðrastaðni kann breiða seg til onnur lond og ávirka fíggjar- og partabrævamarknaðir um allan heimin.

Rentustøðið í heiminum næstu 1-2 árini fer sjálvsagt eisini at ávirka gongdina í heimsbúskapinum. Hækka renturnar skjótari og meira enn roknað verður við, verður vøksturin helst lægri enn mett, og fíggjar- og partabrævamarknaðir kunnu eisini ávirkast av tí. Hinvegin kann eisini hugsast, at lágu oljuprísirnir vera eitt varandi fyribrigdi, og at tað kann stimbra húsarhaldsnýtslu og íløgur meira enn væntað næstu árini.

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt at gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og almenna geiranum sum heild seinastu árini. Mynd 12 vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og RLÚ-úrslit síðani 1997 við mettum tølum fyri 2015 og tølum úr framroknaða fíggjarlógaruppskotinum fyri 2016.

Myndin vísir greitt, at inntøkurnar ávirkast meira av sveiggjunum í búskapinum enn útreiðslurnar. Útreiðslurnar hava verið meira støðugt vaksandi síðani 1997, meðan inntøkurnar eru vaksnar minni og meira óstøðugt. Harvið hevur landskassin havt hall síðani 2008 og fer væntandi eisini at hava hall í 2015. Tað er tekin um, at langtíðarjavnvág er ikki millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum.

Mynd 13 vísir bruttoskuld og innistandandi hjá landsstýrinum (gjaldførið). Bruttoskuldin hjá landinum er vaksin munandi síðani 2007, men landið hevur enn ikki nógva skuld sammett við fleiri onnur lond í Vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum er um leið 35% av BTÚ, og aftrat hesum er um leið 1 mia. kr. í bruttoskuld hjá kommunum tilsamans (um leið 7% av BTÚ).

Almenna bruttoskuldin í Evropa er til sammetingar um leið 90% av BTÚ í miðal, meðan hon er um leið 45% av BTÚ í Danmark.

**Mynd 12**

**Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2016**




Viðm.: Tølini fram til og við 2014 eru roknskapartøl. Tølini fyri 2015 eru mett tøl.
Tølini fyri 2016 eru játtanartøl.
* Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
Kelda: Gjaldstovan.

Er rikni fíggjarpolitikkurin ikki haldførur langt áramál, er vandi fyri, at kredittvirðið hjá landinum versnar, og at rentustøðið hjá landinum hækkar, sum frá líður. Her eigur eisini at verða havt í huga søguliga lágu renturnar í løtuni, og at rentustigið sum heild kann hækka næstu árini. Tí er umráðandi, at hallið hjá landinum minkar, og at javnvág fæst næstu árini, sum eisini hevði bøtt um haldførið á rikna fíggjarpolitikkinum.

**Mynd 13**

**Landskassans bruttoskuld og innistandandi í mió. kr. og % av BTÚ, 1997 til 2014**




Kelda: Gjaldstovan og Hagstovan.

Metingar hjá Fíggjarmálaráðnum av bygnaðarliga hallinum hjá tí almenna vísa, at tað almenna helst hevði bygnaðarligt hall í 2014, sum var um leið 300 mió. kr. Tað merkir, at neyðugt verður við varandi tiltøkum bæði innan inntøkur og útreiðslur hjá tí almenna til tess at betra javnvágina millum almennar inntøkur og útreiðslur og harvið haldførið í almenna búskapinum.

**Mynd 14**

**Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar), % av BTÚ, 1998 til 2013**




Kelda: Hagstovan.

Útreiðslurnar hjá landi og kommunum á millum annað heilsu- og almannaøkinum fara at vaksa munandi næstu árini orsakað av broyttari aldurssamanseting og betri viðgerðarmøguleikum. Hetta fer at hava við sær trýst á útreiðslurnar hjá landi og kommunum, sum nú umsita eldraøkið. Eitt ítøkiligt tiltak, sum hevði bøtt um haldførið í almenna búskapinum, er seta í verka eina pensjónsnýskipan, sum hevði minkað útreiðslurnar hjá landinum til eftirlønir

Landsstýrið tók lánsbrævalán, sum var um leið 1 mia. kr. í juni mánaði í ár. Gildistíðin á láninum er um leið fimm ár, og rentan á láninum var sera lagalig (1% p.a.). Tað merkir, at landið hevur sera gott kredittvirði. Harafturat hevur kredittmetingarstovnurin Moody's broytt útlitini á ratingini til støðug og endurtikið skoðsmálið av lánførinum (ratingini) hjá landinum í august í ár.

Sostatt bendir alt á, at kredittvirðið hjá landinum framhaldandi verður gott næstu 1-2 árini. Í sambandi við metingina frá Moody's, sigur stovnurin, at skoðsmálið kann ávirkast av fleiri ymiskum viðurskiftum næstu árini. Eydnast ikki at lækka hallið í hjá landinum, sum ætlað, næstu 1-2 árini, fer hetta sannlíkt at hava við sær verri skoðsmál av lánførinum hjá landsstýrinum. Miðalgjaldførið hjá landinum higartil í ár er um 2,2-2,3 mia. kr., sum er omanfyri minsta gjaldførið fyri 2015 á 2,15 mia. kr.

## Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2016

Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2016, sum nýggja landsstýrið leggur fyri Løgtingið, er eitt framroknað uppskot til fíggjarlóg, har ið inntøkur og útreiðslur eru framroknaðar við verandi lógargrundarlagi og mettari gongd. Orsakað av løgtingsvalinum í september, vóru ikki stundir hjá nýggja landsstýrinum at fyrireika fíggjarpolitisk tiltøk og fylgilóggávu, áðrenn uppskotið til fíggjarlóg skuldi latast Løgtinginum.

Ætlanin er í staðin at arbeiða við fleiri broytingaruppskotum til fíggjarlógina í sambandi við løgtingsviðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum. Hetta verður gjørt, so hvørt tiltøk verða fyrireikað og løgd til rættis, og fylgilóggáva er gjørd.

Talvan niðanfyri vísir inntøkur, útreiðslur og RLÚ-úrslitið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2016. Í talvuni niðanfyri eru nettorentuútreiðslur (um leið 37 mió. kr.) tiknar við á útreiðslusíðuni.

**Høvuðstøl í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2016**

| *Mió. kr.* | **2016** |
|---|---|
| Inntøkur í alt | 4.559,8 |
| Útreiðslur í alt | 4.704,1 |
| RLÚ-úrslit | -144,2 |

### Framrokningar av inntøkum og útreiðslum

Stóru inntøkurnar, vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, eru í 2016 framroknaðar við metta vøkstrinum í ársins prísum. Eftir hetta er framroknað við mettum vøkstri í føstum prísum.

### Játtanir innan løgur í 2016

Innan løgujáttanir eru hesar millum stóru játtanirnar í 2016:

- Skúladepilin við Marknagil
- Landssjúkrahúsið
- Nýggir landsvegir

## Inntøkur landskassans í 2016

Inntøkurnar eru mettar til 4.560 mió. kr. netto í 2016 (uttan rentuútreiðslur). Her eigur at verða viðmerkt, at Barsilsskipanin er umløgd, soleiðis at skipanin nú er flutt í grunn. Tað merkir, at inntøkurnar (og útreiðslurnar) síggjast nú ikki á fíggjarlógini sum áður. Nettoinntøkur frá skattum eru mettar til 2.031 mió. kr. Avgjøld og tollur eru mett til 2.142 mió. kr. netto. Heildarveiting er 642 mió. kr.

Talvan niðanfyri vísir inntøkurnar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2016. Orsøkin til at skattainntøkurnar verða mettar at lækka nakað í 2016 sammett við 2015 er, at kapitalvinningsskatturin var óvanliga høgur í 2015 vegna serligar umstøður.

**Meting av inntøkum landskassans í 2015 og 2016**

| *mió. kr.* | **R-2014** | **FL-2015** | **Meting 2015** | **FL-2016** | **Munur frá FL15 til FL16 (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 2.138 | 2.000 | 2.089 | 2.031 | -2,8% |
| Avgjøld og tollur | 2.075 | 2.163 | 2.086 | 2.142 | 2,7% |
| Ymsar inntøkur | 62 | 74 | 42 | 58 | 38,1% |
| Flytingar | -198 | -326 | -326 | -313 | 4,0% |
| Heildarveiting o.t. | 635 | 642 | 642 | 642 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **4.712** | **4.552** | **4.533** | **4.560** | **0,6%** |

## Útreiðslur landskassans í 2016

Rakstrar-, løgu- og útlánsútreiðslur (netto) verða mettar til 4.704 mió. kr. í 2016. Harav eru rakstrarútreiðslurnar 4.375 mió. kr., løguútreiðslurnar eru 292 mió. kr., og rentuútreiðslurnar eru 37 mió. kr. netto. Talvan niðanfyri vísir útreiðslurnar.

**Meting av útreiðslum landskassans í 2015 og 2016**

| *mió. kr.* | **R-2014** | **FL-2015** | **Meting 2015** | **FL-2016** | **Munur FL-2016 til FL-2015 (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstur | 4.588 | 4.336 | 4.275 | 4.375 | 2,3% |
| Rentur, netto | 18 | 85 | 89 | 37 | -58,4% |
| Løgur | 360 | 271 | 317 | 292 | -7,9% |
| **Tilsamans** | **4.966** | **4.692** | **4.681** | **4.704** | **0,5%** |

## Løgur í 2016

Løgukarmurin í fíggjarlógaruppskotinum 2016 er 292 mió. kr. Aftrat hesum eru óbrúktar løgujáttanir frá 2015, sum hava átekning, soleiðis at tær kunnu verða framfluttar. Sostatt er sannlíkt, at nakað meira verður brúkt av løgukarminum í 2016 enn tær 292 mió. kr., sum eru játtaðar í fíggjarlógini.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu løgukarmurin á 292 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2016 er raðfestur. Játtanin til felagið P/F Skálafjarðar- og Sandoyartunnilin verður viðgjørd sum stuðulsjáttan. Játtanin til felagið er 25 mió. kr. í 2016.

| **Løguætlanin fyri 2016** ***(mió. kr.)*** | |
|---|---|
| **Løgur §1 - §17 tilsamans** | **292.250** |
| **§2 Løgmansfyrisitingin** | **2.000** |
| Umbygging í Tinganesi | 2.000 |
| **§ 7 Mentamál** | **123.550** |
| Skúladepil við Marknagil | 111.000 |
| Hvalastøðin við Áir | 1.000 |
| Kringvarp Føroya | 10.300 |
| Kirkjubømúrurin | 1.250 |
| **§ 11 Heilsu- og innlendismál** | **69.000** |
| Medicoteknisk tól | 9.000 |
| Landssjúkrahúsið | 60.000 |
| **§ 17 Samferðslumál** | **97.700** |
| Umvæling av almennum bygningum | 22.000 |
| Almennir bygningar, søla | -3.000 |
| Nýggir landsvegir | 60.500 |
| Havnir | 2.200 |
| Strandfaraskip Landsins | 16.000 |
| **Løgur § 1 - § 17 tilsamans** | **292.250** |

## Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2015

Í játtanarskipanini er ásett, at saman við fíggjarlógaruppskotinum skal greiðast frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum. Her verður greitt frá játtanarligu støðuni samanlagt og fyri hvørja grein sær. Eisini verður víst yvirlit yvir hvørjar játtanir (høvuðskontur), ið verða mettar at fara at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið fíggjarárið er farið. Her verða bæði tiknar við eykajáttanir og játtanir, har ið mett er, at frávik verður, tá ið fíggjarárið er av.

Viðmerkjast skal, at játtanareftirlitið er nógv ávirkað av, at Barsilsskipanin varð umskipað í 2015, sum varð gjørt við samtyktu eykajáttanarlógini í mai 2015. Hetta varð gjørt sum liður í at stovna grunn til Barsilsskipanina. Játtanirnar til barsilsskipan og umsiting av barsilsskipan, sum vóru ávikavist 96 mió. kr. og 2 mió. kr., verða nullstillaðar við inntøkum frá Barsilsgrunninum. Av hesi broyting lækka inntøkurnar soleiðis í árinum 98 mió. kr., og útreiðslurnar lækka við somu upphædd.

**Meting av úrsliti landskassans í 2015 sammett við fíggjarlógina fyri 2015**

| *1.000 kr.* | **FL-2015** | **Meting 2015** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 4.467.240 | 4.443.140 | -24.100 | -0,5% |
| Útreiðslur | 4.607.375 | 4.594.601 | -12.774 | -0,3% |
| **RLÚ-úrslit** | **-140.135** | **-151.461** | **-11.326** | **-8,1%** |

Í talvuni omanfyri er víst RLÚ-úrslit fyri greinarnar § 1 til § 20 (vanligir postar). Aftrat hesum koma serinntøkur á § 55, sum eru 4,8 mió. kr. (niðurlaðing av Búnaðargrunninum). RLÚI-úrslitið verður væntandi um leið -152 mió. kr. í 2015, meðan RLÚII-úrslitið væntandi verður um leið -147 mió. kr. í 2015.

Høvuðsorsøkirnar til, at hallið verður størri enn væntað á fíggjarlógini fyri 2015, eru, at roknast kann við meirnýtslu sammett við fíggjarlógina, sum er um leið 22 mió. kr. innan rakstrarjáttanir umframt at væntandi verður brúkt av løgujáttanum frá undanfarnum árum fyri um leið 45 mió. kr. (netto). Nýtslan av løgujáttanum frá undanfarnum árum ávirkar sjálvsagt roknskaparliga úrslitið hjá landskassanum í 2015. Hinvegin kann roknast við, at inntøkurnar tilsamans vera um leið 75 mió. kr. betri í 2015 sammett við fíggjarlógina, um sæð verður burtur frá, at gjaldið til barsilsskipan verður flutt í grunn frameftir.

Roknast kann við, at RLÚ-úrslitið hjá landskassanum verður á leið tað sama sum úrslitið í fíggjarlógini ella nakað verri. Størstu frávikini sammett við fíggjarlógina eru, at brúkt verður av løgujáttanum, sum eru fluttar frá eldri árum, umframt at roknast kann við meirnýtslu, sum er út við 1% á rakstrarjáttanum sammett við fíggjarlógina.

Mett verður, at inntøkur landskassans í 2015 verða samanlagt 4.443 mió. kr., og útreiðslurnar verða mettar til samanlagt 4.595 mió. kr. Hetta er ávikavist 0,5 og 0,3% lægri enn mett í fíggjarlógini fyri

2015. Sum nevnt omanfyri, er umskipanin av Barsilsskipanini ein høvuðsorsøk til hesi frávik. Hetta hevur við sær, at RLÚ-úrslitið væntandi verður -152 mió. kr.

**Meting av inntøkum landskassans í 2015 sammett við fíggjarlógina eftir virksemisøki**

| *1.000 kr.* | **R-2014** | **FL-2015** | **Meting 2015** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentur av skuld | -116.822 | -115.000 | -105.000 | 10.000 | 8,7% |
| Rentuinntøkur o.tíl. | 98.387 | 30.000 | 16.400 | -13.600 | -45,3% |
| Skattainntøkur | 2.138.039 | 2.000.440 | 2.088.940 | 88.500 | 4,4% |
| Avgjøld og tollur | 2.074.632 | 2.162.900 | 2.085.500 | -77.400 | -3,6% |
| Ymsar inntøkur | 61.867 | 73.500 | 41.900 | -31.600 | -42,9% |
| Flytingar | -198.151 | -326.400 | -326.400 | 0 | 0,0% |
| Heildarveiting o.t. | 635.400 | 641.800 | 641.800 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **4.693.353** | **4.467.240** | **4.443.140** | **-24.100** | **-0,5%** |

Inntøkurnar eru tilsamans 24 mió. kr. lægri enn mett, tá ið fíggjarlógin varð gjørd. Hetta svarar til um leið 75 mió. kr. í meirinntøkum, verður sæð burtur frá broytingini í Barsilsskipanini. Inntøkurnar frá vanligum landsskatti og kapitalvinningsskatti eru væl hægri enn mett. Hinvegin bendir alt á, at inntøkurnar frá meirvirðisgjaldinum og øðrum avgjøldum verða lægri enn mett, tá ið fíggjarlógin varð gjørd.

Rentuútreiðslur av landskassaskuldini eru lægri enn mettar, orsakað av søguliga lága rentustiginum og óvanligum umstøðum á fíggjarmarknaðum. Rentuinntøkurnar av innistandandi eru somuleiðis lægri enn upprunaliga mett, orsakað av kursjavnan vegna broytt rentustig og órógvi miðskeiðis í ár á fíggjar- og partabrævamarknaðum.

**Meting av útreiðslum landskassans í 2015 sammett við fíggjarlógina eftir játtanarslagi**

| *1.000 kr.* | **FL-2015** | **Meting 2015** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 176.452 | 177.144 | 692 | 0,4% |
| Rakstrarjáttan | 2.708.173 | 2.730.574 | 22.401 | 0,8% |
| Løgujáttan | 271.250 | 316.758 | 45.508 | 16,7% |
| Lógarbundin játtan | 1.451.500 | 1.370.125 | -84.350 | -5,8% |
| **Tilsamans** | **4.607.375** | **4.594.601** | **-12.774** | **-0,3%** |

Væntaða meirnýtslan er tilsamans 22 mió. kr. á rakstrarjáttanum sammett við fíggjarlógina. Innan løgujáttanir verður frávikið væntandi um leið 46 mió. kr. Løgujáttanin á fíggjarlógini fyri 2015 var tilsamans 271 mió. kr., meðan metta nýtslan fyri 2015 av løgujáttanum tilsamans er um leið 317 mió. kr. Harafturat eru løgujáttanir fyri tilsamans 107 mió. kr. eru fluttar frá eldri árum. Broytingin í Barsilsskipanini sæst í talvuni omanfyri undir lógarbundnum játtanum. Høvuðsorsøkin til metta frávikið innan lógarbundnar játtanir er, at Barsilsskipanin er umskipað til ein grunn.

Á §11 eru samtyktar eykajáttanir fyri tilsamans um leið 20 mió. kr., millum annað til Landssjúkrahúsið og heilsutrygdarveitingar. Á §12 eru eykajáttanir umbidnar til arbeiðsfremjandi tiltøk og til fólkapensjón á tilsamans um leið 10 mió. kr. Verður sæð burtur frá løgujáttanum, koma frávikini fyri stóran part av, at ov lítið hevur verið játtað á rakstrarjáttanum í fíggjarlógini. Frávikini á lógarbundnum játtanum hava ikki verið eins stór og á rakstrarjáttanum.

**Meting av inntøkum og útreiðslum landskassans í 2015 sammett við fíggjarlógina eftir grein (løgur og rakstur tilsamans)**

| *1.000 kr.* | | **FL-2015** | **Meting 2015** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 48.940 | 51.905 | 2.965 | 6,1% |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 66.450 | 66.800 | 350 | 0,5% |
| § 3 | Fíggjarmál | 430.050 | 437.460 | 7.410 | 1,7% |
| § 5 | Fiskivinnumál | 180.060 | 179.565 | -495 | -0,3% |
| § 6 | Vinnumál | 348.691 | 231.706 | -116.985 | -33,6% |
| § 7 | Mentamál | 1.111.879 | 1.146.327 | 34.448 | 3,1% |
| § 11 | Heilsumál | 985.105 | 1.023.141 | 38.036 | 3,9% |
| § 12 | Almannamál | 1.436.200 | 1.457.697 | 21.497 | 1,5% |
| | Útreiðslur tilsamans | 4.607.375 | 4.594.601 | -12.774 | -0,3% |
| § 20 | Inntøkur | 4.446.240 | 4.443.140 | -24.100 | -0,5% |
| | **RLÚ –úrslit** | **-140.135** | **-151.461** | **-11.326** | **-8,1%** |

Í talvuni omanfyri eru vístar bæði stuðulsjáttanir, rakstrarjáttanir, løgujáttanir og lógarbundnar játtanir. Verður hugt eftir ymsu greinunum, sæst at serliga §1, §6 og §11 víkja frá játtanunum á fíggjarlógini. Metta frávikið á §1 kemur fyrst og fremst av óvæntaðum løgtingskanningum og av løgtingsvalinum. Frávikið á §11 kemur fyrst og fremst av áður umrøddu eykajáttanum til Landssjúkrahúsið og heilsutrygdarveitingar. Harafturat kann roknast við, at brúkt verður nakað á løgujáttanum frá undanfarnum árum á §11.

## Rakstrarjáttanareftirlit

Niðanfyri verður hugt nærri eftir, hvussu játtanarliga støðan er á rakstrarjáttanum, stuðulsjáttanum og lógarbundnum játtanum hjá aðalráðunum. Løgujáttanir eru ikki við í talvunum niðanfyri, við tað at serstakt løgujáttanareftirlit er í frágreiðingini eftir rakstrarjáttanareftirlitið.

## § 1 Løgtingið

**Játtanarliga støðan í september 2015**

| **Høvuðs-konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
|---|---|---|---|---|
| 10.1.02. | Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | Lógarbundin | 1.465.000 | Mett frávik |
| 10.1.03. | Løgtingsarbeiði | Rakstrarjáttan | 1.500.000 | Eykajáttan samtykt í mai og mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **2.965.000** | |

**Meting av útreiðslum á §1 í 2015 sammett við fíggjarlógina fyri 2015**

| *1.000 kr.* | **FL-2015** | **Meting 2015** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 41.940 | 43.440 | 1.500 | 3,6% |
| Lógarbundin játtan | 7.000 | 8.465 | 1.465 | 20,9% |
| **Tilsamans** | **48.940** | **51.905** | **2.965** | **6,1%** |

# § 2 Løgmansfyrisitingin

## Játtanarliga støðan í september 2015

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.02. | Løgmansskrivstovan | Rakstrarjáttan | 350.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 12.3.01. | Løgmaður og landsstýrið | Rakstrarjáttan | 650.000 | Mett frávik |
| 13.3.04. | Menningarsamstarv | Stuðul | -650.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| **Tilsamans** | | | **350.000** | |

## Meting av útreiðslum á §2 í 2015 sammett við fíggjarlógina fyri 2015

| *1.000 kr.* | FL-2015 | Meting 2015 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 9.890 | 9.240 | -650 | -6,6% |
| Rakstrarjáttan | 54.560 | 55.560 | 1.000 | 1,8% |
| Lógarbundin játtan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **64.450** | **64.800** | **350** | **0,5%** |

# § 3 Fíggjarmál

## Játtanarliga støðan í september 2015

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.03. | Fíggjarmálaráðið | Rakstur | -75.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 15.1.04. | TAKS | Rakstur | -5.000.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 15.2.01. | Hagstova Føroya | Rakstur | 75.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 18.1.01. | Tænastumannaeftirlønir | Lógarbundin | 1.400.000 | Mett frávik |
| 18.1.04. | Læraraeftirlønir | Lógarbundin | 1.200.000 | Mett frávik |
| 18.1.07. | Eftirlønir innan heilsuverkið | Lógarbundin | -400.000 | Mett frávik |
| 18.1.10. | Postverk Føroya, eftirlønir | Lógarbundin | -400.000 | Mett frávik |
| 18.2.04. | Danskar eftirlønir | Lógarbundin | 60.000 | Mett frávik |
| 18.2.07. | Eftirlønir landstýrismanna | Lógarbundin | 150.000 | Mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **-2.990.000** | |

## Meting av útreiðslum á §3 í 2015 samanborið við fíggjarlógina fyri 2015

| *1.000 kr.* | FL-2015 | Meting 2015 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 6.000 | 6.000 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 183.250 | 178.250 | -5.000 | -2,7% |
| Lógarbundin játtan | 162.100 | 164.110 | 2.010 | 1,2% |
| **Tilsamans** | **351.350** | **348.360** | **-2.990** | **-0,9%** |

# § 5 Fiskivinnumál

## Játtanarliga støðan í september 2015

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 30.1.01. | Stuðul til umhvørvisverndar-tiltøk | Stuðul | 30.000 | Mett frávik |
| 30.1.07. | Náttúrufriðingar-nevndir | Rakstur | 75.000 | Mett frávik |
| 30.1.10. | Spilloljureinsing | Stuðul | 900.000 | Mett frávik |
| 31.1.06. | Tilbúgving á sjógvi | Rakstur | 1.000.000 | Mett frávik |
| 34.3.08. | P/F Havrann-sóknarskip | Stuðul | -3.000.000 | Mett frávik |
| 34.2.22. | Flutningsstuðul | Lógarbundin | -500.000 | Mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **-1.495.000** | |

## Meting av útreiðslum á §5 í 2015 sammett við fíggjarlógina fyri 2015

| *1.000 kr.* | FL-2015 | Meting 2015 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 20.680 | 18.610 | -2.070 | -10,0% |
| Rakstrarjáttan | 152.880 | 153.955 | 1.075 | 0,7% |
| Lógarbundin játtan | 2.500 | 2.000 | -500 | -20,0% |
| **Tilsamans** | **176.060** | **174.565** | **-1.495** | **-0,9%** |

# § 6 Vinnumál

## Játtanarliga støðan í september 2015

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---:|---|
| 32.1.04. | Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi | Stuðul | -150.000 | Mett frávik |
| 37.1.20. | Vinnustovnurin | Rakstur | 300.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 37.2.04. | Endurgjald til skipasmíð | Stuðul | 1.635.000 | Eykajáttan samtykt í mai og mett frávik |
| 38.2.01. | Strandfaraskip landsins | Rakstur | -700.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 39.1.01. | Semingsmannaskipanin | Rakstur | 200.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 39.4.01. | Barsilsskipan | Lógarbundið | -96.000.000 | Eykajáttan samtykt í mai Fíggjað av Barsilsgrunni |
| 39.4.04. | Umsiting av barsilsskipan | Rakstur | -2.000.000 | Eykajáttan samtykt í mai Fíggjað av Barsilsgrunni |
| **Tilsamans** | | | **-96.715.000** | |

## Meting av útreiðslum á §6 í 2015 samanborið við fíggjarlógina fyri 2015

| *1.000 kr.* | FL-2015 | Meting 2015 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---:|---:|---:|---:|
| Stuðulsjáttan | 32.775 | 34.260 | 1.485 | 4,5% |
| Rakstrarjáttan | 187.116 | 184.916 | -2.200 | -1,2% |
| Lógarbundin játtan | 96.000 | 0 | -96.000 | -100,0% |
| **Tilsamans** | **315.891** | **219.176** | **-96.715** | **-30,6%** |

# § 7 Mentamál

## Játtanarliga støðan í september 2015

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.09 | Mentamálaráðið | Rakstur | 520.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 23.1.18 | Nám | Rakstur | 1.200.000 | Mett frávik |
| 23.2.01 | Fólkaskúlin | Rakstur | 2.500.000 | Mett frávik |
| 23.2.02 | Sernám | Rakstur | 1.150.000 | Eykajáttan samtykt í mai og mett frávik |
| 23.3.05 | Miðnáms-útbúgvingar | Rakstur | -2.520.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 23.5.01 | Fólkaháskúlar | Stuðul | 2.480.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 23.6.16 | Fróðskaparsetur Føroya | Rakstur | 1.400.000 | Eykajáttan samtykt í mai og mett frávik |
| 24.1.07. | Málráðið | Rakstur | 90.000 | Mett frávik |
| 24.3.03. | Søvn landsins | Rakstur | 300.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 24.3.06. | Søvn landsins | Stuðul | -300.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| **Tilsamans** | | | **6.820.000** | |

## Meting av útreiðslum á §7 í 2015 sammett við fíggjarlógina fyri 2015

| *1.000 kr.* | FL-2015 | Meting 2015 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 79.220 | 81.400 | 2.180 | 2,8% |
| Rakstrarjáttan | 784.684 | 789.324 | 4.640 | 0,6% |
| Lógarbundin játtan | 125.475 | 125.475 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **989.379** | **996.199** | **6.820** | **0,7%** |

# § 11 Heilsumál

## Játtanarliga støðan í september 2015

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.24. | Heilsumálaráðið | Rakstur | 1.036.000 | Eykajáttan samtykt í mai og mett frávik |
| 13.3.02. | Neyðhjálp | Stuðul | 650.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 20.2.03. | Heilsutrygdarveitingar | Rakstur | 6.000.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 20.3.04. | Landssjúkrahúsið | Rakstur | 17.300.000 | Eykajáttan samtykt í mai og mett frávik |
| 20.3.15. | Suðuroyar sjúkrahús | Rakstur | 1.000.000 | Mett frávik |
| 20.3.19. | Serstakur sjúkrahúsheilivágur | Rakstur | -4.000.000 | Mett frávik |
| 20.3.23. | Umsiting av sjúklingatrygging | Rakstur | 50.000 | Mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **22.036.000** | |

## Meting av útreiðslum á §11 í 2015 samanborið við fíggjarlógina fyri 2015

| *1.000 kr.* | FL-2015 | Meting 2015 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 1.075 | 1.725 | 650 | 60,5% |
| Rakstrarjáttan | 960.130 | 981.516 | 21.386 | 2,2% |
| Lógarbundin játtan | 6.900 | 6.900 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **968.105** | **990.141** | **22.036** | **2,3%** |

# § 12 Almannamál

## Játtanarliga støðan í september 2015

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 21.3.01. | Barnavernd | Lógarbundin | -950.000 | Mett frávik |
| 21.3.13. | Ættleiðingarstuðul | Lógarbundin | -400.000 | Mett frávik |
| 21.4.01. | Dagpeningaskipan | Lógarbundin | 2.500.000 | Mett frávik |
| 21.6.13. | Vardar íbúðir, rakstrarstudningur | Stuðul | -903.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 21.7.02. | Arbeiðsfremjandi tiltøk | Lógarbundin | 11.400.000 | Eykajáttan samtykt í mai og mett frávik |
| 21.8.01. | Fólkapensjón | Lógarbundin | 3.700.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 21.8.05. | Fyritíðarpensjón | Lógarbundin | -5.200.000 | Eykajáttan samtykt í mai og mett frávik |
| 21.8.13. | Viðbót til ávísar pensjónistar | Lógarbundin | -400.000 | Mett frávik |
| 34.4.04. | Sjúkratrygd | Lógarbundin | 200.000 | Mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **10.747.000** | |

## Meting av útreiðslum á §12 í 2015 samanborið við fíggjarlógina fyri 2015

| *1.000 kr.* | FL-2015 | Meting 2015 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 26.812 | 25.909 | -903 | -3,4% |
| Rakstrarjáttan | 343.613 | 343.613 | 0 | 0,0% |
| Lógarbundin játtan | 1.051.525 | 1.063.175 | 11.650 | 1,1% |
| **Tilsamans** | **1.421.950** | **1.432.817** | **10.747** | **0,8%** |

# § 20 Inntøkur

## Játtanarliga støðan í september 2015

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 50.1.01. | Rentur at gjalda | Ógreinað | 10.000.000 | Nýggj meting |
| 50.2.01. | Rentuinntøkur av innistandandi | Ógreinað | -13.500.000 | Nýggj meting |
| 50.2.04. | Aðrar rentur | Ógreinað | -700.000 | Nýggj meting |
| 50.2.10. | Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | Ógreinað | 600.000 | Nýggj meting |
| 52.1.01. | Vanligur landsskattur | Ógreinað | 45.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.06. | Kolvetnisskattur, persónar | Ógreinað | 2.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.07. | Felagsskattur | Ógreinað | 26.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.09. | Tilfeingis/loyvisskattur | Ógreinað | -4.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.11. | Kapitalvinningsskattur | Ógreinað | 130.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.13. | Avgjald av kapitaleftirlønum | Ógreinað | -15.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.27. | Gjald til Heilsutrygd | Ógreinað | 2.500.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 52.1.28. | Gjald til barsilsskipan | Ógreinað | -98.000.000 | Eykajáttan samtykt í mai, inntøkurnar fluttar í Barsilsgrunn |
| 52.2.01. | Meirvirðisgjald | Ógreinað | -66.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.04. | Tollavgjøld | Ógreinað | 8.000.000 | Nýggj meting |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 52.2.07. | Punktgjøld | Ógreinað | -2.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.10. | Lønhæddargjald | Ógreinað | -2.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.13. | Brennioljugjald | Ógreinað | 1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.14. | Loyvisgjald á alivinnu | Ógreinað | -20.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.15. | Avgjald á fiskatilfeingi | Ógreinað | -26.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.19. | Skrásetingargjald | Ógreinað | 19.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.22. | Vegskattur (vektgjald) | Ógreinað | 4.500.000 | Nýggj meting |
| 52.2.30. | Tinglýsingargjald | Ógreinað | 6.000.000 | Nýggj meting |
| 52.3.04. | Útluting frá partafeløgum og grunnum | Ógreinað | -30.600.000 | Nýggj meting |
| 52.3.10. | Aðrar inntøkur | Ógreinað | -1.000.000 | Nýggj meting |
| **Tilsamans** | | | **-24.200.000** | |

## Løgujáttanareftirlit

Løgukarmurin í fíggjarlógini fyri 2015 er 271 mió. kr. tilsamans. Harafturat eru 107 mió. kr. fluttar frá undanfarnum árum. Samlaða játtanin til løgur í 2015 við framfluttum játtanum (og eykajáttanum) er sostatt 378 mió. kr. Hetta er íroknað sølu av bygningum fyri út við 76 mió. kr. Løgujáttanin brutto er sostatt umleið 454 mió. kr. í 2015.

Roknast kann við, at um leið 317 mió. kr. verða nýttar av løgujáttanunum í 2015. Seinastu árini hevur verið torført at meta um nýtsluna av løgujáttanum fyri alt árið, og óvissa er um hesa meting. Ein stór orsøk til, at roknað verður við lutfalsliga stórari meirnýtslu innan løgujáttanir í 2015, er, at ætlanin, sum nevnt omanfyri, var at selja bygningar fyri út við 75 mió. kr. í 2015. Í løtuni er ivasamt, um til ber at selja hesa bygningar í ár, ella um partur av sølunum verður framdur í 2016 í staðin.

| *Heiti (1.000 kr.)* | **Flutt frá eldri árum** | **FL 2015** | **EyJ 2015** | **Játtan tilsamans 2015** | **Mett nýtsla 2015** | **Mett flyting til 2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 2 Løgmansfyrisitingin** | **0** | **2.000** | **0** | **2.000** | **2.000** | **0** |
| Umbygging í Tinganesi | 0 | 2.000 | 0 | 2.000 | 2.000 | 0 |
| **§ 3 Fíggjarmál** | **11.124** | **78.700** | **-5.400** | **84.424** | **89.100** | **5.124** |
| Umvæling av almennum bygningum* | 0 | 22.000 | -600 | 21.400 | 21.400 | 0 |
| Nýggir Landsvegir | 11.124 | 59.000 | 0 | 70.124 | 65.000 | 5.124 |
| Havnir | 0 | 8.700 | 0 | 8.700 | 8.700 | 0 |
| Almennir bygningar, søla* | 0 | -11.000 | -4.800 | -15.800 | -6.000 | 0 |
| **§ 5 Fiskivinnumál** | **0** | **4.000** | **1.000** | **5.000** | **5.000** | **0** |
| Tilbúgvingarætlan* | 0 | 0 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 0 |
| Almenn jørð, keyp | 0 | 4.000 | 0 | 4.000 | 4.000 | 0 |
| **§ 6 Vinnumál** | **4.237** | **32.800** | **0** | **37.037** | **12.530** | **24.507** |
| Granskingarlund** | 230 | 0 | 0 | 230 | 230 | 0 |
| Strandfaraskip landsins | 4.007 | 32.000 | 0 | 36.007 | 11.500 | 24.507 |
| Akstovan | 0 | 800 | 0 | 800 | 800 | 0 |

*...framhald*

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 7 Mentamál** | **49.212** | **122.500** | **3.100** | **174.812** | **150.128** | **84.684** |
| Skúlin á Trøðni* | 0 | 0 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 0 |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 11.558 | 12.000 | 0 | 23.558 | 20.000 | 3.558 |
| Skúladepil við Marknagil | 13.853 | 155.000 | 0 | 168.853 | 100.000 | 68.853 |
| Skúladepil við Marknagil, søla av bygningum*** | 0 | -60.000 | 0 | -60.000 | 0 | 0 |
| Studentaskúlin, HF, Eysturoy | 10.746 | 12.000 | 0 | 22.746 | 15.000 | 7.746 |
| Kringvarp Føroya, løga | 8.328 | 0 | 0 | 8.328 | 8.328 | 0 |
| Tjóðleikhús | 4.727 | 0 | 0 | 4.727 | 200 | 4.527 |
| Hvalastøðin við Áir | 0 | 2.500 | 0 | 2.500 | 2.500 | 0 |
| Kirkjubømúrurin | 0 | 1.000 | 0 | 1.000 | 1.000 | 0 |
| Ítróttarhøll á Sandoynni* | 0 | 0 | 600 | 600 | 600 | 0 |
| | | | | | | |
| **§ 11 Heilsumál** | **18.046** | **17.000** | **0** | **35.046** | **33.000** | **2.046** |
| Medicoteknisk tól | 0 | 9.000 | 0 | 9.000 | 9.000 | 0 |
| Landssjúkrahúsið, útbygging | 18.046 | 6.000 | 0 | 24.046 | 22.000 | 2.046 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 0 | 2.000 | 0 | 2.000 | 2.000 | 0 |
| | | | | | | |
| **§ 12 Almannamál** | **24.763** | **14.250** | **903** | **39.916** | **25.000** | **14.916** |
| Bústovnar o.a.* | 24.763 | 14.250 | 903 | 39.916 | 25.000 | 14.916 |
| | | | | | | |
| **Løgujáttanir tilsamans** | **107.382** | **271.250** | **-397** | **378.235** | **316.758** | **131.277** |

Viðmerkingar:
* Eykajáttan samtykt í mai 2015.
** Eingin játtan er í 2015, bara framflutt játtan frá undanfarnum fíggjarárum.
***Ógreitt er, hvat verður gjørt við bygningarnir í Marknagili í ár.